VIÐMERKINGAR

# Móðurmálslærugreinin má skipast

**Páll Isholm**



**Eingin fer nakrantíð at tilevna undirvísingartilfar og námsfrøðiligar vegleiðingar fyri okkum, og eingin annar fer nakrantíð at útbúgva lærarar at undirvísa í okkara móðurmáli. Um vit skulu vænta betri frálæru í móðurmálinum, er avgerandi neyðugt, at sjøtul verður settur á eitt meira grundleggjandi og samanhangandi arbeið í tilrættarleggingini av okkara móðurmálslærugrein. Mítt uppskot er, at eitt móðurmálsráð verður sett á stovn, sum hevur til endamáls at skipa lærugreinina.**

Okkara kæra ð og okkara kæra rættskriving eru aftur á breddanum í kjakinum um føroyska málið og frálæruna í móðurmálslærugreinini. Ymiskar hugsanir hava verið havdar á lofti. Onkur heldur, at skriftmálið eigur at broytast, um føroyingar skulu læra at skriva føroyskt betur og rættari, meðan onkur heldur, at best er at halda fast við tað, sum er.

Eftir mínum tykki nerta hesi sjónarmið neyvan við kjarnuna í trupulleikanum, okkara móðurmálslærugrein hevur. Kjarnan er nevniliga vantandi samanhangur millum ymisku stigini í útbúgvingarverkinum, vantandi frálærutilfar, vantandi námsfrøðilig viðgerð og vantandi fatan av, hvat ein móðurmálslærugrein er.

Móðurmálslærugreinin er einasta lærugrein, vit hava hundrað prosent ábyrgd av, og tí mugu vit leggja nógv størri orku í at menna lærugreinina á øllum økjum í skúlaverkinum. So leingi móðurmálið ikki hevur ta rúmd, sum tað eigur at hava, so leingi kann man heldur ikki rokna við, at undirvísingin verður nóg góð.

**Fortreytir fyri góðari frálæru**
Allar lærugreinir byggja á fleiri fortreytir, fyri at ein skynsom og tíðarhóskandi frálæra og læring kann fara fram.

Í fyrsta lagi er neyðugt, at vit finna útav, hvat móðurmál undirvísingin skal byggja á. Skal tað vera tað, sum vit kenna frá okkara fyrstu sjey liviárum, ella skal tað vera eitt dreymamál, sum er tilevnað útfrá ynskjum hjá einum lítlum skara av máláhugaðum, ella skal tað kanska vera okkurt har ímillum. Í hesum sambandi kundi verið hugt at møguligum tillagingum í skriftmálinum.

Í øðrum lagi er neyðugt, at fakligi førleikin hjá einstøku lærarunum er í lagi.

Í triðja lagi er avgerandi, at ymisku stigini í útbúgvingarverkinum tosa saman og vita, hvat hvør annar ger.

Í fjórða lagi er avgerandi, at móðurmálið byggir á eina skipaða tilgongd og tilevning av frálærutilfari.

**Hvat er eitt móðurmál?**
Tað er ein inngrógvin partur av gerandisdegnum í Føroyum, at føroyingar ganga og rætta hvør annan málsliga, og stundum tykist hetta hava størri týdning enn sjálvt innihaldið í tí, sagt verður. Hetta er helst ein avleiðing av førda málpolitikkinum. Nógv tykjast hava gloymt, at málið er eitt samskiftisamboð, og føroyska málið er amboðið hjá okkum føroyingum at samskifta.

Eitt móðurmál skal fyrst og fremst úr høvdinum niður á pappír, meðan eitt fremmandamál bæði skal inn í høvdið og niður á pappírið nærum samstundis. Her er ein avgerandi munur á frálæruhættunum, og skeivur frálæruháttur kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri móðurmálið og fatanina av hesum.

Námsfrøðiliga vantar ein viðgerð av føroysktfrálæruni sum móðurmálsfrálæru. Móðurmálið er ikki eitt eintýðugt fyribrigdi. Móðurmálið er eitt sera persónligt samskiftisamboð, ið hevur alstóran týdning fyri persónliga sjálvsvirðið og dirvið at geva sínar hugsanir til kennar.

Í grundini er móðurmálið avgerandi fyri eitt vælvirkandi fólkaræði, og um vit kenna okkum ótrygg, so kenna vit okkum eisini ótrygg í okkara samskifti og lata kanska vera við at luttaka í kjaki. Hetta er ein nógv størri trupulleiki enn kjakið um smáar ábøtur á sjálva stavsetingina.

Neyðugt er við eini grundleggjandi greining av, hvat vit vilja læra børnini, og hvønn grundvøll hendan frálæra skal byggja á. Skulu vit geva okkum far um at styrkja føroyskt sum móðurmál, mugu vit eisini taka støðið í tí, sum er okkara móðurmál og sleppa dreymamálshugsanini.

Ein liður í hesum arbeiði kundi verið at gjørt tillagingar í skriftmálinum, sum Ólavur Hátún í áhugaverdari grein herfyri umrøddi. Hetta kundi t.d. verið gjørt eftir skilagóða uppskotinum, Eivind Weyhe málfrøðingur legði fram fyri nøkrum árum síðani.

**Fakligi førleikin**
Ofta hevur verið langað út eftir lærarum á ymisku skúlunum fyri ikki at læra børnini og ungdómin nóg gott føroyskt. Mangan man hetta vera ógrundað, og spurningurin er, um tað altíð er lærarin, sum hevur alla ábyrgdina. Og hevur nakar nakrantíð lýst, hvat **nóg gott føroyskt** merkir?

Lærarin hevur ta útbúgvingina, sum myndugleikarnir krevja. Um lærarin ikki hevur førleikan, er møguliga okkurt galið við skipanini, sum klekir hann. At meta um fakliga førleikan hjá einum lærara krevur annað og meira enn at hyggja at úrslitunum hjá næmingum hansara. Hvussu er t.d. við eftirútbúgving av føroysktlærarum?

Tað krevur eisini, at vit seta førleika læraranna inn í ein samanhang við málsetningin, ið náast skal á einstøku útbúgvingarstigunum, og teir hjálparmiðlar, lærarin hevur til taks í frálæruni.

Í fólkaskúlanum í dag hevur ein lærari nógvar lærugreinir at hugsa um á fleiri ymiskum stigum. Tá er avgerandi, at lærarin hevur tilfar til taks, ið kann hjálpa honum; tí eingin er serfrøðingur í øllum. Tá mett verður um frálæruna, má ein heildarmeting gerast, og ikki ein døming av øllum lærarum, sum undirvísa í føroyskum.

Nógvir gera eitt ómetaliga stórt og dygdargott arbeið, meðan aðrir kenna seg púra hjálparleysar, tí lítið og einki munagott frálærutilfar er, og eftirútbúgving er eingin. Men at undirvísa í føroyskum sleppa teir ikki undan, og tá verður úrslitið hareftir.

**Samanhangur og endamál**
Í føroyska útbúgvingarverkinum hava vit 10 stig í fólkaskúlanum og vanliga 3 í miðnámsskúlunum. Á øllum hesum stigum er móðurmálið ein sjálvsagdur partur.

Tískil kundi verðið spurt, um nakar veit, hvørji minstakrøvini eru til einstaka stigið, og hvørji minstakrøvini eru til stigbólkarnar 1. - 3. skúlaár, 3. - 7. skúlaár, 8. - 10. skúlaár og 1. - 3. miðnámsskúlaflokk, og hvussu hesi hanga saman sínamillum, og hvussu tey hanga saman við gerandisdagin í føroyska samfelagnum. Møguliga lekur millum teori og praksis.

Víðari kundi verið spurt, um øll hesi stig tosa saman, og um lærarar eru nóg væl kunnaðir um, hvat niðaru stigini arbeiða við. Tað er jú ein fortreyt fyri at møta næminginum á ein skynsaman og fakliga og námsfrøðiliga forsvarligan hátt.

**Frálærutilfarið**
Vit mugu hava dygdargott undirvísingartilfar fyri at náa endamálinum. Tað er týdningarmikið, at ein samskipan fer fram í tilevningini av undirvísingartilfari, og at føroysk forløg samstarva um eina útgávuætlan, sum hongur saman og tænir endamálunum.

Tilvildarlig útgáva av frálærutilfari, ið fyrst og fremst byggir á tørvin, evnini og hugin hjá onkrum einstøkum lærara, er ikki nóg góð. Tað má gerast ein yvirskipað ætlan, ið byggir á eina kanning av allari móðurmálslærugreinini frá fyrsta til síðsta stig í útbúgvingarverkinum.

**Uppskot um framferð**
Eitt uppskot um, hvussu vit kunnu fara undir eina skipaða tilgongd, er, at sett verður eitt ráð, eitt móðurmálsráð, ið hevur móðurmálslærugreinina og frálæru í hesi sum aðalmál.

Í ráðnum eiga at sita fakfólk frá øllum stigum í føroysku útbúgvingarskipanini. Hetta ráð eigur at ráðgeva landsstýrismanninum í mentamálum um føroyskt sum lærugrein í fólkaskúlanum og miðnámsskúlunum. Ikki ein bólkur, sum skrivar eitt álit um rættskrivingina ella um einstøk orð, men eitt ráð, sum støðugt ráðgevur um tillagingar og ábøtur, sum eiga at fremjast í móðurmálslærugreinini.

Ráðið skal virka sum ein ráðgevarabólkur, ið kemur við ítøkiligum tilmælum um námsfrøðina í móðurmálslærugreinini, um neyðugt tilfar, um endamálsorðingar, ið hanga saman eisini millum útbúgvingarstigini.

Ráðið skal somuleiðis gera eina útgávuætlan, sum hevur til endamáls at tippa tey stóru hol, sum eru, og sum hevur til endamáls at skapa ein samanhang í frálærutilfari, læraravegleiðing, útbúgving og eftirútbúgving av føroysktlærarum.

Eisini er týdningarmikið, at vit seta skipaðar kanningar í verk av frálæruni og úrtøkuni í lærugreinini og alsamt eru opin fyri nýggjum møguleikum og avbjóðingum á øllum stigum í útbúgvingarverkinum.

Hetta ljóðar kanska sum ein stórur gloypibiti, men eingin ger arbeiðið fyri okkum. Skulu vit koma trupulleikunum við m.a. stavseting og vantandi virðing og áhuga fyri lærugreinini til lívs, má farast undir eina skipaða og nútímans menning av fakliga førleikanum, av sambandinum millum útbúgvingarstigini og av frálæru-tilfarinum. Ikki fyrrenn tá kunnu vit tosa um at røkja okkara móðurmál á ein skynsaman hátt í skúlanum.

Og hvør veit, kanska ein dag verður ð'ið tann minsti trupulleikin.

# Kvøldseta á Kambsdali

**Eitt nú fer Rúni M. Hansen at hugleiða um tíðina, tá ið hann gekk í studentaskúlanum, og næmingar fara at spæla tónleik, syngja og greiða frá frítíðarítrivi**

TÍÐINDASKRIV

Tvær ferðir árliga bjóðar Studentaskúlin á Kambsdali til kvøldsetu. Tann seinna kvøldsetan í hesum skúlaárinum verður nú hóskvøldið. Talan er um alment tiltak, sum plagar at fáa góða undirtøku. Umframt næmingar og teirra næstu plaga fyrrverandi næmingar at nýta høvið at vitja á skúlanum sovorðin kvøld, og eisini tey, sum eru áhugað í sangi og tónleiki og sum annars vilja fáa okkurt at vita um alt millum himmal og jørð, um tað ber til at siga tað soleiðis.

Hesa ferð er tað soleiðis, at 9. og 10. flokkarnir í Norðoyggjum og Eysturoy hava fingið serliga innbjóðing um at vera við. Tað eru hesir næmingarnir, sum í hesi vikuni skulu taka avgerð um, um teir skulu og hvar teir skulu halda fram við skúlagongdini eftir summarfrítíðina. Hesir næmingarnir hava fyri nøkrum vikum síðani verið og vitjað á Kambsdali, og nú fáa teir eitt eyka høvi so at siga at rógva aftur á aftur.

Sangur og tónleikur eiga altíð stórt pláss í tiltøkum hjá studentaskúlanum. Soleiðis er tað eisini hesa ferð. Talan verður hesa ferð um lættan sang og tónleik – rapp, rock og popp, sum tað verður nevnt í innbjóðingini.

**Førningur og førleikar**
Ein táttur, sum ofta hevur verið á skránni, er, at ein fyrrverandi næmingur á skúlanum hugleiðir um førningin og førleikan, sum tíðin í studentaskúlanum gav honum og harvið um hvørja nyttu hann fekk burtur úr studentaskúlaárunum.

Hesa ferð verður tað Rúni M. Hansen, sum er ættaður úr Fuglafirði og var liðugur í studentaskúlanum í 1987. Hann arbeiðir nú hjá Statoil, har starvsheitið hjá honum er Generel Manager. Hann er stjóri í føroysku deildini hjá Statoil, sum hevur við oljuleitingina at gera, og hann er við í leiðsluni fyri europeiska Statoil. Rúni arbeiðir í Stavanger og í London, men hann býr í Føroyum, og hóskvøldið kemur hann beinleiðis úr London og á Kambsdal at greiða frá, hvat hann fekk burturúr teimum trimum árunum, sum hann var í studentaskúlanum.

**Næmingar og frítíðin**
Næmingar, sum ganga í studentaskúla og á HF skeiði, eru ofta týdningarmiklir stuðlar í mentunarlívinum á plássunum, har teir búgva. At næmingarnir hava serligar førleikar kemur eisini skúlanum til góða.

Á kvøldsetunum er ætlanin, at tað skal verða fastur táttur, at næmingar, sum á onkran hátt eru rættuliga virknir, skulu greiða frá, hvat tað er, sum teir fáast við og siga eitt sindur um, hvussu tað bar til, at teir hava við júst hetta at gera.

Hesa ferð eru tað tveir úrmælingar á tvørfloytu, sum fara at vísa sítt kynstur og í samrøðu at siga eitt sindur um søguna aftanfyri spælið. Talan er um um tær báðar Bodil Simonsen og Fríðhild Hansen.

Næmingar í 2. ab, sum hava týskt, fara at spæla sjónleikin "Good bye, Lenin", og so verður café, har tað verður høvi at keypa kaffi og te og okkurt heimabakað afturvið. Tað eru næmingar 1. r, sum eru HF næmingar, ið ætla sær námsferð næsta skúlaár, ið skipað fyri caféini.

Kvøldsetan á Studentaskúlanum á Kambsdali verður nú hóskvøldið, 11. mars, klokkan 19.30 – stundisliga.

# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hans Jákup Joensen, biskupur:

## Heiðraður við »Kommandørkorset af Dannebrogordenen«



Frá 1. januar 2004 er Hans Jacob Joensen, bispur, heiðraður við riddarakrossinum "Kommandørkorset af Dannebrogordenen".

Hans Jacob Joensen er 65 ár gamal, ættaður frá Gjógv. Hann tók studentsprógv í Havn í 1958 og cand. theol. útbúgving við Københavns Universitet í 1968.

Hann var fastur hjálparpresetur við Anne Kirke á Nørrebro frá 1968-70 og í Risbjerg Kirke frá 1970 til 1975, tá hann fekk starv sum prestur í Havn.

Hann hevur verið biskupur í Føroyum síðan 1990.

## Dánial Petur Hansen nýggjur formaður í Sjálvstýrisflokkinum



Á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum leygardagin varð Dánial Petur Hansen valdur til nýggjan landsnevndarformann hjá Sjálvstýrisflokkinum, tá landsnevdnin eisini varð vald av nýggjum.

Lasse Klein, fyrrverandi løgtingsmaður, var landsnevndarformaður fram til landsfundin, men hann bar seg undan afturvali.

Dánial Petur Hansen er 35 ára gamal og gjørdist eftir løgtingsvalið 20. januar, varamaður hjá Kári P. Højgaard, løgtingsmanni.

Dánjal Petur er giftur við Duritu Hansen, og tey eiga fýra børn. Dánjal Petur er útbúgvin BA í búskapi og starvast sum fulltrúi í Innlendismálaráðnum.

Hann hevur fyrr starvast í Oljumálaráðnum og hjá Virkisráðgeving í Saltangará, har hann var ráðgevi. Hann hevur eisini verið við til at samskipa ta fyrstu fiskivinnumessuna í Føroyum, North Atlantic Fish Fair. Hann hevur eisini – áðrenn hann fór uttanlands at lesa – starvast sum tíðindamaður á Tingakrossi.

Á landsfundinum leygardagin varð Ása Olsen úr Tórshavn vald at halda fram sum næstformaður í Landsnevndini.

## Forkunnug konsert í Kommunuskúlanum



*13 dugnaligir næmingar á violin, bratsch, cello og kontrabass eru savnaðir í strúkiorkestrnum til hesa fyrstu upptraðkan teirra, ið verður í Kommunuskúlanum í Havn í kvøld. Spæld verða verk eftir Purcell, Vivaldi, Handel og Mozart*

**Í kvøld, mikukvøldið kl. 19.30, verður høvi at uppliva eina spennandi og ókeypis konsert í Kommunuskúlanum**

KONSERT

Tórshavnar Musikkskúli fer í kvøld at framvísa úrslitið av tveimum nýggjum undirvískinartiltøkum, ið hava sæð dagsins ljós í hesum skúlaárinum. Tað snýr seg partvís um kamartónleik fyri framkomnum næmingur og partvís um eitt varandi strúkiorkestur – og í báðum førum er tað Bernhardur Wilkinson, ið undirvísir næmingunum.

Kamartónleikur er eitt meira krevjandi slag av samanspæli, ið og við at tað er ein tónleikari, ið spælir hvørja rødd, og er hetta ein mennandi avbjóðing fyri meira framkomnum næmingum. Spæld verða verk eftir Bach, Beethoven, Piazzola og Poulenc.

Tað hevur leingi verið eitt stórt ynski hjá Musikkskúlanum at stovna eitt strúkiorkestur, og tað sær nú út til at fara at eydnast, hóast orkestrið bara hevur vant síðan nýggjár, eru tey longu á góðari leið.

13 dugnaligir næmingar á violin, bratsch, cello og kontrabass eru savnaðir í strúkiorkestrnum til hesa fyrstu upptraðkan teirra. Spæld verða verk eftir Purcell, Vivaldi, Handel og Mozart.

## Dagurin

**10. mars. Eðla**. Einki halgimenni er við hesum navni, men sipað verður kanska til enska abbadissu Sankta Etelredu, sum doyði 10. mars í árinum 626.

Helst týska navnið Adelheid, *hin ediliga.*

# Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum, sum gleddu meg á 25 ára starvsdegnum.

Leiðsla og starvsfelagar í Norðoya Sparikassa, takk fyri at tit gjørdu dagin so minnisríkan.

*Bestu heilsanir*
**Kristian Martin Eliasen**
**Leirvík**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góði maður mín, sonur, beiggi, pápi, verpápi og abbi okkara

**Árni Nielsen**
**Tórshavn**

andaðist sunnudagin 7. mars 2004, 59 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 11. mars kl. 14.00

*Familjunnar vegna*

**Tórgerð, Helgi, Bogi og Terji**